Starvslýsing

Heimatænastan

## Pedagogur til Sambýlið í Smærugøtu 29

Søkt verður eftir pedagogi til Sambýlið í Smærugøtu 29 til setan 15. mai 2010 ella eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Julionnu Næs Olsen, leiðara á tlf. 763120

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:

Sambýlið í Smærugøtu
Smærugøta 29
100 Tórshavn
Stílað: Julianna Næs Olsen

**Umsóknarfreist: 21. apríl 2010**

Les alla lýsingina á heimasíðu okkara
www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Roknskaparfólk til Nærverkið

Í Nærverkinum eru tvey størv sum roknskaparfólk leys at søkja. Talan er um eitt starv uppá 30 tímar til setan frá 1. mai 2010 ella eftir avtalu, sum er staðsett á Meginskrivstovuni á Argjum. Hitt starvið er eitt fullltíðarstarv á økisskrivstovuni fyri Heimatænastuna í Klaksvík til setan frá 1. juni 2010 ella eftir avtalu.

**Starvið í Klaksvík**
Arbeiðsuppgávur:
- Vanligt bókhald innan Heimatænastuna, sum í dag ikki hevur egið bókhald.
- Debitorrøkt
- Kredittorrøkt
- Kassauppgerðir o.a.
- Mánaðarlig avstemman
- Skipa fyri innanhýsis fíggjarstýring og saman við økisleiðaranum verða við í arbeiðinum at gera fíggjarætlanir fyri økini umframt at hava eftirlit við fíggjarstøðuni hjá økjunum.

Umframt roknskaparuppgávur fevnir arbeiðið eisini um aðrar fyrisitingarligar uppgávur í sambandi við feriu o.a.

**Starvið á Meginskrivstovuni**
Arbeiðsuppgávur:
- At føra roknskaparhald fyri økini, sum í dag er í Meginskrivstovuni:
- Vanligt bókhald
- Debitorrøkt
- Kredittorrøkt
- Kassauppgerðir o.a.
- Mánaðarlig avstemman
- Ráðgeving og samskipan í mun til roknskaparfunktiónir, sum liggja desentralt

**Vit rokna við, at tú hevur:**
- Viðkomandi útbúgving
- Góðan telduførleika
- Ert fleksibul og hevur evni at læra nýtt
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Kunnleika til FSL bókhaldsskipan landsins er ein fyrimunur
- Royndir innan almenna fyrisiting er ein fyrimunur

**Setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Marionnu Nielsen, fíggjarfulltrúa tlf. 360018.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við viðmerking um, hvat starv søkt verður um saman við prógvi og møguligum viðmælum verður at senda til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Stílað: Eva H. Bennicke, fíggjarstjóri
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 13. apríl 2010 kl. 12.00.**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Zarepta



# Familjulega fyri fólk við breki

## Høvuðsevnið á leguni verður »Náttúra, menning og virðing«

Hjartaliga vælkomin á legu á Zarepta í døgunum 29. apríl - 2. mai 2010

Legan er ætlað øllum, ið bera brek, og familjum, stuðul og hjálparfólkum teirra.

Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, er millum annað:

- fyrilestrar
- andakt
- tónleikur
- ríðing
- spæl úti og inni
- busstúrar
- pallborð
- kvøldsøga
- leikvenjing
- svimjing
- trælist
- gallakvøld
- samtalubólkar
- sangur
- fimleikur
- gongutúrar
- video

**FYRILESTRAR:**

**Fríggjdag 30. apríl**
Kl. 10.00 - Menning í og við náttúruni – Eilen Æðustein og Anna Maria Anthoniussen

**Fríggjdag 30. apríl**
Kl. 15.15– SI - sansaintegration - Jónhild Busk

**Leygardagin 1. mai**
KL 14.00 – At skilja og virða hvørannan – Elin Vang

**Havið hetta við**
- Dýnuvár, koddavár og lak
- Um tú verður við á túrum og svimjing – heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistivlar og svimjiklæði.

**Kostnaður fyri leguna:**

| | |
|---|---|
| Børn 0-5 ár | 100 kr. |
| Børn 6-14 ár | 225 kr. |
| Vaksin | 400 kr. |
| Foreldur v/børnum í mesta lagi | 1.200 kr. |

Konto 6460 1609787

Húsið er opið hóskvøldið kl. 18.00
Náttúrði verður boðin frá kl. 19.30
Legan verður sett kl. 21.00

Ring til ein av undirritaðu, um spurningar eru í sambandi við leguna.

**Norðoyggjar**
Jógvan Tróndheim, tlf. 456822

**Suðuroy**
Majbritt West, tlf. 375284 / 575284

**Annars**
Elisabeth Mortensen, tlf. 317244 / 517244
Samly Reinert, tlf. 318720 / 518720

Verið hjartaliga vælkomin aftur í ár! Sigið øðrum frá og bjóðið teimum við! Tilmelding á teldupost: brek@zarepta.fo ella við at ringja 288720 áðrenn 22. apríl.

*Vinarliga*

**Zarepta**

# Partabrøv til sølu

Vegna P/F Tvøran í konkurs verða hesi partabrøv lýst til sølu, um hóskandi boð fæst:

Partabrøv í Sp/f Sansy Trawl (Sp/f nr. 2068) áljóðandi kr. 250.000,00. Sambært viðtøkunum hava verandi smápartaeigarar forkeypsrætt.

Partabrøv áljóðandi kr. 230.000,00 í LKT Ognir (Sp/f nr. 4028). Sambært viðtøkum smáfelagsins hava smápartaeigarar forkeypsrætt.

Partabrøv áljóðandi kr. 1.400.000,00 í P/F 21. juli 2009 (áður Sp/f Roc Amadour) (Sp/f nr. 4395). Partarnir kunnu avhendast frítt millum upprunaligu partaeigararnar, men annars einans við loyvi frá nevndini.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

Sosialurin
www.sosialurin.fo